# E - og tónleikurin



**Niels Arge Galán, gittarspælari í bólkinum 200**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja. Vit hava altíð havt ein kassagittar og seinni eitt klaver, sjálvt um ongin ordiliga spældi seriøst upp á tey. Eg gekk til klaver sum ungur. Men so, tá ið pápi mín hevði fingið ein nýggjan gittar úr Spania, sum skuldi vera lítil (gittarin), men ikki var tað, og beiggi mín var ov lítil at spæla uppá hann, tók eg gittaran til mín og havi ikki slept honum síðan. Klaverið fór, sum vera man, í ommu sína.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Gittar og mandolin og munnharpu.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Onkuntíð – sum oftast »My Way«, sum Elvis sang hann.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Tónleikur hevur sjálvandi nógv at siga. Hann fyllir nógv í gerandisdegnum hjá mær.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– 400-500 alt íroknað.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Ongin serstøk, so eg má nevna nakrar: Neil Young: Tonight's the Night (faktiskt allar (næstan) hjá Neil). Ry Cooder: Into the Purple Valley. Led Zeppelin: BBC Sessions.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– »Har er bert hin eini«. Sí niðanfyri hví.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Sangurin »Har er bert hin eini«, har frelstir føroyingar glaðir tralla um, hvussu øll, ið ikki eru kristin, skulu kolast upp í helviti í allar ævir, tá ið dómadagur kemur... »Milliónir skulu glatast, tra la la la la laa...«

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Suff. Mær dámar ikki at særa fólk, so eg nevni hana ikki her. Viðmerkjast kann, at hon ikki stendur frammi. Hon er úr Klaksvík. Tað er ein kvinna, ið syngur. Hon liggur í tí til høvið upprættaða fløgukøstinum, har pínligar fløgur liggja. Hesar havi eg aloftast ikki keypt, men fingið í sambandi við plátufelagsarbeiði.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Onga. Og um eg fekk eina slíka, endaði hon bara í køstinum, so eg eri garderaður.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Helst okkurt hjá Elvis.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Bob Dylan kanska ella onkra stilla hjá Neilinum.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Fløguna »Tonight's the Night« hjá Neil Young.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Ongin sangur.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– »One Way Ticket« hjá einum diskoorkestri, sum vistnokk æt Eruption. Nokkso Boney M líkt. Tað var á spolabandi. Tá var eg fimm ár. Eisini ein sangur sum æt »Down by the River«. Minnist ikki, hvør spældi hann. Babbasa tónleikur.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Tað fer nokk at vera »Country-krist« við Mold. Annars eri eg sera glaður fyri 200%.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– »Man with a Harmonica« (spaghetti western-tónleikur). Men familjan hjá mær skuldi nokk funnið upp á okkurt annað...

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Neil Young, Roskilde í fjør. Hann bestemmar bara... Spældi 1 1/2 tíma ov leingi.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Neil Young aftur, men eg veit ikki, hvat eg skuldi sagt við hann. Eg haldi eg hevði bjóðað honum til Føroyar at gera plátu og at spæla grottukonsert.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Flóvin Eidesgaard, Keypmannahavn, flovin@math.ku.dk
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Stríð um skattalætta

Ikki bara føroyingar gleða seg til skattalætta.

Danska pressan hevur í seinastuni viðgjørt spurningin um skattalætta nógv, og høvuðsyvirskriftin er nú, at stríð er millum donsku stjórnarflokkarnar Venstre og Konservative um skattalætta: Hvussu stórur skal hann vera, nær skal hann fremjast, hvør skal hava ágóðan, hvussu skal hann fíggjast. (Helst eisini, hvør skal hava heiðurin fyri hann!) Men semja er millum eygleiðarar um, at skattalættin er á veg.

Gallup hevur gjørt kanning, hvat danir halda. Gallup koyrir danir í tríggjar næstan javnt stórar bólkar: Ein, sum vil hava tað almenna at veita meira vælferð, eisini hóast tað merkir hægri skattir. Ein, sum vil lækka skattin, eisini hóast tað merkir minni vælferð. Og ein, sum vil hava skattin at lækka, og eisini vil hava meira vælferð. Hetta ger støðuna trupla hjá politikarum, sum lurta eftir veljarunum: Meiriluti er fyri at lækka skattin, og meiriluti er fyri fleiri almennum útreiðslum.

Fleiri orsøkir kunnu vera fyri at geva skattalætta: At broyta umfordeilingina, at økja virksemið, at økja arbeiðsútboðið, ella bara hugsjónarligar orsøkir.

Umfordeilingin frá ríkum til fátæk kann økjast við at geva skattalætta til láginntøkur. Skattalætti til háinntøkur virkar sjálvandi øvugt og minkar umfordeilingina.

Vil man hava samfelagshjólini at mala skjótari, kann skattalætti virka við at geva fólki meira pening at brúka. Hetta virkar serliga tá tíðirnar er ringar. Og tá vil skattalætti til láginntøkur virka best, tí hjá láginntøkum fer størri partur av einum skattalætta til størri nýtslu.

Er endamálið við einum skattalætta at økja arbeiðsútboðið er ikki líka einfalt. Tað er m.a. marginalskatturin, t.e. skatturin av seinast vunnu krónuni, sum ávirkar, hvussu nógv fólk arbeiða. Men venda vit aftur til meiningarkanningar, so hevur ein nýggj kanning, sum verður kunngjørd í dag, víst, at tá veljast skal millum meira í løn, meira frítíð ella meira til pensjónsuppsparing, vil helvtin av dønum hava meira frítíð, og minni enn triði hvør vil hava meira í løn. Tað gevur ábending um, at ikki øll fara at arbeiða meira, um skatturin lækkar, men nøkur kanska tvørturímóti fara arbeiða minni, tí meira er eftir av bruttolønini, og harvið skulu færri tímar til at forvinna tað sama. Og so er ikki vist, at avleiðingin verður tað, sum ætlanin var.

Ideologisk argument fyri skattalætta ganga ofta út uppá, at pengarnir hoyra heima í lummanum hjá fólki, sum hava forvunnið teir, og meira polemiskt, at fólk vita best sjálvi, hvussu pengarnir skulu brúkast.

Skulu vit venda aftur til stríðið millum Venstre og Konservative um skattalættan, eiga vit kanska at byrja við samgonguskjalinum. Venstre lovaði undan seinasta vali skattestop, sum merkir, at eingin skattaáseting skuldi hækka í prosentum ella krónum. Konservative lovaðu skattalætta. Endin var, at samgonguskjalið ásetti skattestop beinanvegin, og skattalætta seinni, um ráð vóru. Og harvið byrjaði stríðið, kann man siga.

Konservative hava teir fimtan mánaðirnar henda stjórnin hevur sitið, fýra ferðir megnað at fáa skattalættar á dagsskrá í miðlunum við ymiskum rættiliga ítøkiligum uppskotum um, hvussu ein skattalætti kann fremjast og fíggjast.

Fyrst vildu teir minka barnastyrkin í stigum og samstundis lækka skattin, soleiðis at tað ikki rakti barnafamiljurnar ov hart. Venstre hevði lovað at vælferðarsamfelagið skuldi verjast, vildi halda hetta vallyfti, og segði nei til uppskotið hjá Konservative.

Síðani var ætlanin hjá Konservative at rokna sokallaðar dynamiskar effektir inn og fíggja ein skattalætta við at fólk væntandi fingu hug at arbeiða meira og fóru at brúka meira pening orsakað av skattalættanum. Hesum sjónarmiði talaði Fogh Rasmussen sjálvur fyri fyri tólv árum síðani, tá hann var skattaministari. Men nú segði Fogh, at pengarnir skuldu vera í kassanum, áðrenn teir skuldu latast sum skattalætti, so hann trýr ikki longur uppá Breckmannomics.

Seinni vildu Konservative fremja generellar og málrættaðar sparingar í almenna sektorinum. Generellar sparingar ganga út uppá, at útreiðslurnar til fyrisiting vaksa minni enn lønar- og prísvøksturin, men hesar verða longu framdar og brúktar fyri javnt og samt at økja produktivitetin í almenna sektorinum.. Og Venstre svaraði um málrættaðar, at teir vildu hava ávíst sparingarnar fyrst.

Og kanska var tað tað, sum í síðstu viku fekk Konservative at vilja minka vøksturin í sosialum veitingum og samstundis geva skattalætta. Teir vístu á, at upphæddirnar, sum fólk fáa í sosialum veitingum hava vaksið skjótari enn lønin hjá teimum sum forvinna minst. Argumentið fyri skattalættanum var so, at tað ikki so væl munar at arbeiða í staðin fyri at vera arbeiðsleysur.

Orsøkin til hesa gongd er, at sosialu veitingarnar verða dagførdar ájavnt við vøksturin í miðal lønum. At sosialar veitingar vaksa skjótari enn lønin hjá teimum lægstløntu má tí merkja, at ójavnin í lønum er vaksin. Tað hevur forrestin eingin víst á enn!

Hetta vísir eitt áhugavert fyribrigdi, sum kann kallast eitt incitaments-paradoks. Ofta verður sagt at størri spjaðing í lønunum økir hugin at stremba eftir at forvinna meira, t.d. at fáa sær útbúgving. Men sum er merkir hetta í staðin, at hjá arbeiðsleysum munar minni at søkja arbeiði.

# ítróttur

Nr. 42 • leygardagur • 1. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# VB kann staðfesta oddasessin

**Vinnur VB útidystin í Klaksvík, er ilt at síggja, at tær á nakran hátt kunnu tveita meistaraheitið burtur**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Endaspælið hjá kvinnum er nú um at koma í helvt, og tað er helst eingin loyna, at sum støðan er í løtuni, so eru VB stórfavorittar at vinna FM. Og tað er ikki bara grundað á stigatalvuna.

Spælið hjá oddaliðnum hevur fyri tað allar mesta verið sera sannførandi í endaspælinum. Tær hava longu vissað sær heitið sum steypavinnarar, og ikki minst, so hava tær eisini ta á pappírinum léttastu dystarskránna eftir.

Í veruleikanum kann sigast – hóast allir dystir sjálvandi eru opnir – at FM-heitið kann blíva mest sum avgjørt, um VB fær øll stigini við sær, nú tær vitja í Klaksvík. Gera tær tað, so eru tær fýra stig framman fyri VÍF, og so skal VB í minsta lagi tapa tveir dystir, samstundis sum VÍF vinnur allar sínar dystir.

Og tað er illa hugsandi, at VB – um so verður – fer at tveita nógv stig burtur. Eftirverandi dystarskráin sigur, at VB seinnu helvt av grundspælinum bert hevur tveir útidystir. Nevnliga í Vestmanna og í Runavík. Øll hini liðini hevur VB hitt á útivølli, og er tí talan um heimadystir, har VB í ár hevur sýnst mest sum ótakiligt.

Tí er einki at ivast í, at VB fer at leggja nógvu orku í dystin sunnudagin. Hinvegin er tað eisini av alstórum týdningi hjá Stjørnuni, at tær fáa nakað burturúr. Stríðið um triðja plássið er ógvuliga hart í løtuni, og tí er hvørt einstakt stig avgerandi í so máta.

### StÍF og Kyndil kappast

Tveir aðrir dystir verða eisini leiktir í kvinnudeildini um vikuskiftið. Mest spennandi av hesum er kanska tann í Havn, har StÍF kemur á vitjan hjá Neistanum. Á pappírinum er hetta í øllum førum ein dystur, sum StÍF ikki hevur ráð at tapa, um tær skulu halda fast í bronsudystinum. Neistin hevur ikki staðið seg nakað serligt í ár – og als ikki í endaspælinum – men hinvegin hava tær til tíðir gjørt ein vørr, so heilt avskrivast skulu tær í øllum førum ikki.

Tað skal Tjaldur neyvan heldur, hóast heldur ikki tær hava havt nakra serliga úrtøku í ár. Enn er tó ein lítil møguleiki at bjarga sessinum í deildini, men so skal talan eisini gerast um sigur, tá Kyndil vitjar. Kyndil skifti venjara fyri hálvari aðru viku síðani, og so er spurnigurin, hvørja ávirkan hetta hevur havt á liðið. Einki er at ivast í, at leikara fyri leikara er Kyndil væl og virðiliga sterkari enn Tjaldur, men royndirna siga tó, at tað ikki altíð er hetta, sum er avgerandi. Kollektivið skal eisini rigga, og tað verður kanska týdningarmesta uppgávan hjá nýggja Kyndils-venjarum hesar seinastu dystirnar av kappingarárinum.



*Enn er langt eftir á mál, men vinnur VB dystin í Klaksví, hava tær í øllum førum tikið eitt risafet mótvegis FM-heitinum*

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 5 | 5 - 0 - 0 | 448 | 359 | 89 | 19 |
| 2 | VÍF | 6 | 4 - 1 - 1 | 416 | 342 | 74 | 17 |
| 3 | Stjørnan | 5 | 1 - 1 - 3 | 367 | 371 | -4 | 11 |
| 4 | Kyndil | 5 | 2 - 1 - 2 | 416 | 423 | -7 | 11 |
| 5 | StÍF | 4 | 1 - 1 - 2 | 374 | 402 | -28 | 9 |
| 6 | Neistin | 5 | 1 - 0 - 4 | 332 | 367 | -35 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 4 | 1 - 0 - 3 | 317 | 406 | -89 | 3 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 530 | 432 | 98 | 17 |
| 2 | StÍF | 4 | 2 - 2 - 0 | 454 | 394 | 60 | 15 |
| 3 | Neistin | 4 | 1 - 1 - 2 | 447 | 428 | 19 | 12 |
| 4 | Kyndil | 4 | 1 - 2 - 1 | 427 | 427 | 0 | 10 |
| 5 | KÍF | 5 | 1 - 2 - 2 | 440 | 471 | -31 | 9 |
| 6 | H71 | 5 | 3 - 0 - 2 | 436 | 489 | -53 | 9 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 0 - 1 - 4 | 421 | 514 | -93 | 4 |

## Máltindarnir

### Kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 136 | (29) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 126 | (39) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 122 | (63) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 121 | (34) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 118 | (41) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 112 | (17) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 112 | (36) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 102 | (20) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 85 | (24) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 84 | (5) |
| Alina Olaru | StÍF | 76 | (8) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 74 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 72 | (6) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 63 | (9) |
| Laila Jespersen | VB | 60 | |

### Menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 151 | (17) |
| Damir Oros | KÍF | 137 | (26) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 117 | (19) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 111 | (2) |
| Áki Olsen | VÍF | 97 | (7) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 95 | (7) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 90 | (21) |
| Ingi Olsen | VÍF | 89 | (20) |
| Áki Mørk | Neistin | 83 | (25) |
| John Zachariasen | VÍF | 80 | |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 72 | (14) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 70 | |
| Finnur Hansson | Kyndil | 68 | (10) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 67 | (22) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 66 | |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 17 | 14 - 3 | 46 | 20 | 26 | 20 |
| 2 | Mjølnir | 17 | 13 - 4 | 45 | 17 | 28 | 19 |
| 3 | TB | 17 | 13 - 4 | 44 | 15 | 29 | 18 |
| 4 | Dráttur | 17 | 7 - 10 | 26 | 38 | -12 | 9 |
| 5 | Fleyr | 17 | 3 - 14 | 13 | 44 | -31 | 5 |
| 6 | KÍF | 17 | 1 - 16 | 8 | 48 | -40 | 1 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 14 | 12 - 2 | 38 | 8 | 30 | 16 |
| 2 | SÍ | 14 | 8 - 6 | 26 | 21 | 5 | 13 |
| 3 | Mjølnir | 14 | 8 - 6 | 27 | 23 | 4 | 11 |
| 4 | Fram | 13 | 6 - 7 | 22 | 23 | -1 | 8 |
| 5 | Fleyr | 13 | 0 - 13 | 1 | 39 | -38 | 0 |